Tórshavn, tann 15. mai 2020

# Longjan av Corona semju

Corona semjan millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskar Sjukrarøktarfrøðingar sum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið tekur undir við, ið er galdandi frá 18. mars 2020 til 15. mai 2020 fyri Sjúkrahúsverk Føroya verður longd til og við 31. mai 2020.

# Corona semja

Hugsandi um serstøku støðuna í Føroyum orsaka av corona virusinum, tekur Kommunala Arbeiðsgevarafelagið undir við semjuni millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskar Sjúkrarøktarfrøðingar sum eina fyribils semju, ið er galdandi í 1 mánað frá 19. mars til 15. apríl 2020

Semjan verður endurskoðað eftir tørvi sum støðan í landinum broytist.

Verandi sáttmáli er galdandi, við niðanfyristandandi undantøkum:

- Møguleiki er at longja vaktirnar, so tær í mesta lagi verða 12 tímar, men tá eru seinastu 4 tímarnir at rokna sum yvirtíð. Fyri fastlønt starvsfólk verða hesar 12 tímars vaktir roknaðar soleiðis: Allir arbeiddir tímar fara í normin og tímarnir millum 8 og 12 geva 50% eyka til avspáking ella útgjald.

- Fyri tímalønt verður vaktin roknað soleiðis: 8 vanligar tímar + 4 úrtíðartímar.

- Mest loyvda vikutímatal er 60 tímar íroknað yvirtíð, um ikki annað er avtalað í hvørjum einstøkum føri.

- Undantak verður givið til planlagt úrtíðararbeiði.

- Undantak verður givið til at sjúkrarøktarfrøðingar kunnu flytast millum deildir, har hædd verður tikin fyri førleikum og støðu hjá tí einstaka.

- Sjúkrarøktafrøðilesandi frá eind 1 til 14 fáa 85% av lønartrin 1 í galdandi lønartalvu umframt eftirløn og

- Sjúkrarøktafrøðilesandi í eind 15 og 16 fáa 95% av lønartrin 1 í galdandi lønartalvu umframt eftirløn.

- Hvílitíðin skal ongantíð fara niður um 8 tímar um døgnið.

**Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar** **Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**